fj



# AVLOYSARI FYRI FULLTRÚA Í UTTANRÍKISTÆNASTUNI

**Starvið**
Søkt verður eftir avloysara fyri løgfrøðing, ið fer í barsilsfarloyvi í næstum. Starvið verður at seta skjótast til ber og er fyribils tíðaravmarkað til 1. februar 2021. Tann, ið verður settur í avloysarastarvið, fer væntandi at røkja uppgávur á fleiri arbeiðsøkjum í Uttanríkistænastuni.

**Førleikakrøv**
Kravt verður, at umsøkjarin hevur:

- kandidatútbúgving frá hægri lærustovni í løgfrøði. Umsøkjarar við øðrum samfelagsvísindaligum útbúgvingum, t.d. diplomati, stjórnmálafrøði, búskaparfrøði ella øðrum viðkomandi útbúgvingum, kunnu eisini søkja.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Umráðandi er, at tann, ið settur verður:

- hevur góð samstarvsevni,
- hevur góð sundurgreiningarevni,
- hevur góðar samskiftisførleikar í føroyskum og enskum, bæði munnliga og skrivliga,
- hevur politiskt tev,
- er tænastuhugaður, fleksibul og miðvísur,
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar hava innlit í uttanríkisøkið og almenna fyrisiting.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Roknast kann við, at arbeiðstíðin stundum fellur uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, lívsrensli (c.v.) o.ø. kann sendast til:

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
Ella við teldurposti til **ummr@ummr.fo**

Umsóknin skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **týsdagin 10. mars**. Umsøkjarar eru vælkomnir at venda sær til Gunnar Holm-Jacobsen, stjóra fyri uttanríkistænastuna, á tel. 556106, fyri at fáa nærri upplýsingar. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Setanarsamrøður væntast at fara fram í viku 12 (*16. -20. mars 2020*)

***Uttanríkistænastan,*** *ið bygnaðarliga er partur av* ***Uttanríkis- og mentamálaráðnum,*** *røkir og samskipar uttanríkispolitiska arbeiði landsstýrisins. Arbeiðsøkið fevnir um millumlandasamstarv, heruppií handilsviðurskifti, trygdarmál, havtilfeingi, økisbundið samstarv, heruppií norðurlendska og arktiska samstarvið, altjóðarætt, tjóðar-branding, menningarsamstarv, neyðhjálp, útflutningsframa, protokoll,og konsularviðurskifti. Sendistovurnar í Brússel, London, Reykjavík, Keypmannahavn, Moskva og Beijing eru partur av uttanríkistænastuni. Sí heimasíðu Uttanríkis- og mentamálaráðsins* www.ummr.fo